

*Norðurlandahúsið hevur karmarnar og eina organisatión, sum skal samstarva við mentanarumhvørvið um tiltøk.*
*- Men hugskotini, initiativini og drívmegin eiga at koma frá listafólkunum og feløgum teirra, tí tey vita best, hvat tey hava at bjóða, hvat er spennandi og nær rætta løtan er, sigur Niels Halm, stjóri á 25 ára degnum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

nú verður tikin alment í nýtslu í sambandi við 25 ára haldið. Við nýggja bygninginum vónar Niels Halm at kunna økja um inntøkugrundarlagið hjá Norðurlandahúsinum. Millum annað til fleiri stórar altjóða ráðstevnur og vinnulívsturismu, sum vit longu hava upplivað við vitjanunum hjá Clinton og Gore.

- Eg havi brúkt stóran part av mínari orku og tíð til at fáa fígging til vega til nýggja bygningin, og at finna framtíðar samstarvspartnarar, sum kunnu vera við til at tryggja eitt framhaldandi høgt og fjølbroytt støðið á mentanarliga og listarliga útboðnum í húsinum, sigur Niels Halm. Hann ivast ikki í, at Føroyar og Norðurlandahúsið eru eitt attraktivt ferðamál hjá vinnulívsfólki og granskarum, tá ráðstevnur skulu haldast.

- Her er ein heilt serlig atmosfera í Føroyum, sum fólk uttan iva vilja ferðast langt fyri at uppliva. Stórbara náttúran og krunkasvarti náttarhimmalin eru bert dømi um serkenni, sum vit eiga at bjóða útlendskum gestum, sigur Niels Halm.

Hann viðgongur eisini, at orsøkin til, at hann hevur nýtt so nógva orku til júst hetta er, at Norðurlandaráðið longu hevur signalerað, at húsið skal byggja upp eitt samstarv millum vinnulív og mentan.

- Røddir eru alla tíðina frammi um, at meira orka og peningur skal leggjast í at møta globaliseringini. Tí eru vit sjálvandi eisini noydd at fylgja við, og at laga okkum til tann veruleika, sum vit liva í, sigur Niels Halm. Í hesum sambandi vísir hann á, at tað hevur stóran týdning fyri umdømið hjá húsinum at hýsa vitjanum sum tær hjá Clinton og Gore.

## Endamálið óbroytt

Spurdur, hvat endamálið so er við húsinum, trívir Niels Halm í upprunaliga endamálið, sum framvegis er galdandi: Endamálið við Norðurlandahúsinum er at fáa norðurlendska mentan til Føroyar og at fáa føroyska mentan til onnur norðurlond umframt at stuðla føroyskari mentan.

- Men fyri at stuðla sjálvstøðugari mentan og list, mugu vit eisini hava nakrar tryggar inntøkur at stuðla við. Sostatt er primera uppgávan ikki broytt, sigur Niels Halm.

- Man má altíð menna seg, tí onki er støðugt. Og vit noyðast at fylgja við og at endurnýggja okkum, hugsa innovativt, fyri á tann hátt at skapa grundarlag fyri øllum virkseminum, sigur Niels Halm, sum ikki sær hetta sum nakran trupulleika, men heldur sum eina stóra avbjóðing.

Uppá spurningin, um Norðurlandahúsið livir eina ótrygga tilveru, drálar hann eitt sindur, men svarar til endans, at tey kenna ikki fíggjarkarmin fyri 2009. So tað sigur næstan seg sjálvt.

- Globaliseringin skal hava sítt nú, so vit mugu royna at hugsa kreativt fyri at halda støðinum uppi, staðfestir hann. Kortini hevur húsið fingið størri játtar seinastu árini, tí tað hevur átikið sær ávísar umsitingarliga uppgávur fyri Norðurlandaráðið á mentunarøkinum.

## Norðurlond fyrimyndir

Ofta verður spátt um framtíðina. Men hvør verður støðan hjá Norðurlandahúsinum um tíggju ár sambært Niels Halm?

- Um tíggju ár er sjálvandi hend ein stór broyting. Ongin ivi er um tað. Serliga um vit hyggja suðureftir rokni eg við at elligamla norðurlendska samstarvið verður fyrimyndin fyri aðrar regiónir í EU, sigur Niels Halm. Hann vísir í hesum sambandi á, at EU er týdningarmikið sæð frá einum búskaparligum sjónarhorni, men samfelagsliga sæð gongur norðurlendska samstarvið á odda, tí londini líkjast so nógv.

- Tí eiga vit ikki at undirmeta samstarvið, men heldur víðka tað, ikki minst innan gransking, mentan og útbúgving, sigur Niels Halm, sum roknar við at halda fram í starvinum, tá fýra ára skeiðið er runnið. Hetta hevur stýrið í øllum førum heitt hann á.

- Har eru framvegis fleiri snøklar, sum skulu greiðast, millum annað fyri at fáa nýggja útboðið marknaðarført, og allan teknikkin at virka. So eg ynski ikki at sleppa arbeiðinum, meðan tað enn liggur á hálvum gekki, sigur hann.

## Saknur í listastevnuni

Listafólk hava ofta fýlst á, at Listastevnan varð tikin av, tá Niels Halm tók við stjórasessinum. Hetta var annars avrik, sum undangongustjórin, Helga Hjørvar, stóð á odda fyri. Til hetta sigur Niels Halm, at hóast Listastevnan var eitt gott initiativ, so var tað ein altjóða stevna, heldur enn norðurlendsk.

- Trupulleikin var eisini, at húsið stóð einsamalt – bæði fyri tiltakinum og fyri allari fíggingini. Og av tí, at stevnan lá á markinum fyri okkara virkisøki, so metti eg ikki, at vit høvdu ráð til at halda fram við henni, sigur Niels Halm, sum heldur hevði spjatt vágan, við at fáa fleiri samstarvspartnarar við, serliga til fíggingina.

- Men eg havi hoyrt, at góð fólk eru í ferð við at skipa fyri onkrum líknandi aftur, og tá eru vit sjálvandi áhugað í at leggja pallar og líknandi til. Men eftir mínum tykki, skal Norðurlandahúsið ikki taka stig til og einsamalt standa sum fyriskipari av so stórum tiltøkum, tað eru ráðini snøgt sagt ikki til, sigur Niels Halm. Hann forklárar víðari, at húsið hevur karmarnar og eina organisatión, sum skal samstarva við mentanarumhvørvið um tiltøk.

- Men hugskotini, initiativini og drívmegin eiga at koma frá listafólkunum og feløgum teirra, tí tey vita best, hvat tey hava at bjóða, hvat er spennandi og nær rætta løtan er, sigur Niels Halm, sum sigur seg hava trivist sera væl í Føroyum hesi síðstu trý árini. Ikki minst hevur hann havt stóra fragd av føroysku náttúruni, bæði í góðum og ringum veðri.

- Eg eri natúrumenniskja og gangi nógv í haganum. Og tað er ongin trupulleiki at ganga í vánaligum veðri, regni og mótvindi, bara tú kennir leiðina, tú ganga skalt, sigur hann at enda.

---

# entan og list

Hvussu er samstarvið millum Bryggjuna og Norðurlandahúsið í Føroyum? Vit hava gott samband og nakrar av okkara framsýningum hava eisini verið í Norðurlandahúsinum. Ein framsýning er partur av framtaki Húsins í Brussel. Vit hava áhuga í samstarvi og vit eru opin fyri samstarvi við Norðurlandahúsið í Føroyum.

At enda spyrja vit Helgu Hjørvar hvørja heilsan, hon hevur til húsið á 25 ára degnum, og hvørji ynski hon hevur fyri Húsið og fyri norðurlendska mentanarsamstarvið í framtíðini.

Vit bæði Úlfur vilja fegin bera fram eina kvøðu til Húsið og tess núverandi og fyrrverandi starvsfólk. Vit heilsa føroyskum listafólkum og áskoðarum húsins og ynskja øllum til lukku við teimum tjúgufimm árunum. Vit ynskja fyri Norðulandahúsið í Føroyum, at hildið verður fram við at vísa tað besta í føroyskari eins væl og útlendskari list. Vit her á Norðurbryggjuni síggja fram til framvegis at kunna bjóða danska almenninginum framúrskarandi føroyska list.

# Týðandi stovnur fyri Føroyar og øll Norðurlond

**Sviin Lars Hjertén er stýrisformaður í Norðurlandahúsinum. Vit hava hitt formannin í sambandi við, at húsið verður 25 ár og samstundis munandi víðkað.**

NLH 25 ÁR
*Jóannes Dalsgaard*
*jd@sosialurin.fo*

Lars Hjertén var í mong limur í svenska ríkisdegnum fyri Moderata Samlingspartiet, valdur í Vestara Gøtalandi. Hann hevur eisini verið limur í stýrinum fyri Norðurlendska Mentanargrunnin og er sum nógv svenskir politikarar sannur Føroyavinur.

Spurdur, hvussu hann metir Norðurlandahúsið og leiklut tess í norðurlendska mentanarsamstarvinum, sigur Lars Hjertén:

- Eg meti húsið sera jaliga og sama vil eg siga um tann leiklut, ið Norðurlandahúsið hevur í norðurlendska mentanarsamstarvinum. Norðurlandahúsið er ein sera týðandi stovnur ikki bert fyri Føroyar og Tórshavn men fyri øll Norðurlond. Húsið hevur mestsum fingið leiklutin sum norðurlendsk sendistova í Føroyum.

## Framtíðin

Hvussu sært tú virksemið og leiklutin hja húsinum í framtíðini og í hesum sambandi, hvat kemur víðkanin av húsinum at týða?

- Tann týdningur, sum Norðurlandahúsið hevur, fer púra vist at økjast, nú húsið megnar at taka í móti fleiri og nógv størri ráðstevnum og tiltøkum. Eg kann minna á, at Norðurlandahúsið til dømis hevur hýst ráðstevnum, har ávikavist fyrrverandi forsetin Bill Clinton og Al Gore varaforseti hava tikið lut. Tað er lætt at savna fólk í húsinum og hetta hevur týdning. Tey nýggju hølini koma at hava stóran týdning í møtinum millum menniskju, og vit fara at fáa fleiri rúm, sum kunnu nýtast samstundis, tá ein eitt nú skal býta eina stóra fjøld upp í smærri bólkar. Hetta ger húsið nógv meira funktionelt, so at siga. Her verður sostatt rúm fyri fleiri mentanarligum tiltøkum so væl sum sum ráðstevnum.

## Sparingar á veg

Hvussu metir tú annars, at tað fer at ganga við norðurlendska mentarsamstarvinum, eitt nú við atliti at teimum sparingarætlanum, sum hava liðið á ljóði?

-Vit vita enn ikki rættiliga, hvat ið fer at henda við norðurlendska samstarvinum í framtíðini. Men tá Norðurlandaráðið og Norðurlenska Ráðharraráðið fara at leggja ætlanir fyri framtíðina, er tað sera umráðandi, at Føroyar og Tórshavn við Norðurlandahúsinum kunnu bjóða seg fram við teimum bestu hølunum, sum eru til taks í sjálvstýrandi londunum.



*-Tann týdningur, sum Norðurlandahúsið hevur, fer púra vist at økjast, nú húsið megnar at taka í móti fleiri og nógv størri ráðstevnum og tiltøkum, sigur Lars Hjertén, stýrisformaður í Norðurlandahúsinum*